# Hava keypt náttarlívið í Havn

**Havgrímur Johannesen og Petur Olsen hava gjørt avtalu um at selja samtakið, sum eigur og rekur Café Natúr, Eclipse og Rex. Nýggju »náttarkongarnir« í høvuðsstaðnum eru Eyðun Simonsen, Hans Jørgen Djurhuus og Poul Arni Jacobsen**

NÁTTARLÍV

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Eg setti mær fyri at reka virksemi í undirhaldsvinnuni í fimm ár. Og nú eru fimm ár liðin, síðani eg byrjaði við rakstrinum av Platform.

Soleiðis sigur Havgrímur Johnnesen, stjóri í samtakinum handan tey trý dansi- og skeinkistøðini í Havn. Tá hann byrjaði fyri fimm árum síðani, var tað í kapping við eitt nú Petur Olsen, men fyri tveimum árum síðani gjørdu teir báðir av at kasta saman.



*Eyðun Simonsen, Hans Jørgen Djurhuus og Poul Arni Jacobsen yvirtaka frá 1. apríl trý av stóru dansi- og skeinkistøðunum í høvuðsstaðnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Nýggir náttarkongar

Nú hava teir báðir so eisini gjørt av at selja saman. Og frá 1. apríl í ár verður talan um nýggjar eigarar av samtakinum. Tað eru Poul Arni Jacobsen og Hans Jørgen Djurhuus úr Gøtu, sum saman við Eyðuni Simonsen í Havn hava keypt samtakið fyri eina ikki upplýsta upphædd.

Hóast talan er um ungar menn, so hava teir tríggir longu nú hampuliga drúgvar royndir innan vinnuligt virksemi. Hans Jørgen eigur PW-handilin í Gøtu, Eyðun eigur Kiosk Activ í Havn, og Poul Arni starvast í løtuni hjá grannskoðaravirkinum SPEKT í Havn

Tað verður Poul Arni Jacobsen, sum verður nýggjur stjóri í samtakinum, men hann staðfestir, at talan sum so ikki verður um nakra kollveltnadi broyting.

– Vit síggja hetta sum eina spennandi íløgu, og sjálvir halda vit, at potentialið í hesi vinnuni er rættiliga stórt. Men talan verður tó ikki um nakrar kollveltandi broytingar. Fram til 1. apríl veðrur so eingin broyting, tí handilin verður ikki staðfestur fyrr enn tá. Fryst og fremst, tí vit halda, at ein handil av hesari støddini krevur eina ávísa tíð at gjøgnumføra í øllum smálutum. Hartil hava vit gjørt avtalu um, at Havgrímur fyrstu tíðina kemur at virka sum leiðari hjá okkum. Ikki minst tí hann hevur nakrar sera virðismiklar royndir á hesum økinum, sigur Poul Arni.

### Eingin ivi

Eitt, sum tó verður neyðugt hjá eigarunum, um íløgan skal rentast, verður at virksemið gevur yvirskot. Nakað sum ikki var støðan í 2004.

Hinvegin eru stórar umbyggingar og broytingar annars farnar fram í virkseminum, og Poul Arni tykist hava sera góðar vónir.

– Sjálvandi skal yvirskot fáast burturúr, og tað rokna vit eisini við. Annars høvdu vit ikki farið undir hesa ætlanina. Vit meta avgjørt, at møguleikarnir í hesum eru sera stórir, og vit fara við góðum treysti undir avbjóðingina, staðfestir Poul Arni at enda.

Stephanssons Hús

Elektron
søkir eftir
kervisfólki



Seinasta lagi fríggjadagin 3. februar 2006

Av tí at uppgávurnar alsamt økjast, søkja vit eftir fólki við serførleika innan víðøkis- og lokalnet umframt Windows ambætarar.

Elektron umsitur eina stóra innlegging av Windows ambætarum, og vit hava egið víðøkisnet, ið byggir á tráðleysu breiðbandstøknina WiMAX og Cisco routarar.

Vit reka kervið hjá alsamt fleiri fyritøkum og hava tí brúk fyri netfólki, við serførleika innan Cisco tøkni og fólki við fjølbroyttum innliti í Microsoft tøkni, m.a. Active Directory, Exchange og SQL, og innlit í trygdarviðurskifti í Cisco og Windows innleggingum.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiðslív á einum framtakshugaðum arbeiðsplássi, har vit ofta hava nógv um at vera, og við sera dugnaligum og vinaligum starvsfeløgum. Tú fært nóg mikið av uppgávum og avbjóðingum og fært góðar møguleikar at menna teg. Vit leggja dent á at tú trívist og at javnvágin millum avbjóðingar og handahóvsuppgávur er hóskani fyri júst teg.

Vit rokna við at tú hevur viðkomandi útbúgving og hevur royndir við einum ella fleiri av nevndu økjum. Harumframt leggja vit dent á, at tú ert tænastusinnað(ur) mótvegis bæði starvsfeløgum og kundum, ert røkin, skjótt kann seta seg inn í nýggja tøkni og starvsøkir og kann arbeiða eins væl sjálvstøðugt og saman við øðrum.

soleyd@elektron.fo

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú senda eina umsøkn við c.v. og tilmælum til Sóleyð Hofgaard, systemleiðara, Staravegur 9, 110 Tórshavn, ella við telduposti til soleyd@elektron.fo. Umsøknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. februar 2006.

Hevur tú spurningar til størvini, kanst tú venda tær til Sóleyð Hofgaard, telefon 545128.

Elektron

P/F Elektron er heildarveitari av KT-tænastum. Okkara kundar eru peningastovnar, almennir stovnar og fyritøkur. Størstu partaeigararnir eru Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Føroya Landsstýri. Á P/F Elektron starvast umleið 60 fólk og nettosølan var umleið 50 mió. kr. í 2004.

Staravegur 9 · P.O. BOX 3219
FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 34 51 00
e-mail: info@elektron.fo